# Í kreativa horninum • Í kreativa

*Lagt til rættis: Rigmor Dam*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Tinghúsið á Hjalla er ein dýrgripagoymsla, har kreativar sálir kunnu gera kvetti.
Í Tinghúsinum arbeiða fólk við skerdum førleika við at umvæla gomul ting og at selja tey í handlinum. Tað er Alv, sum stendur fyri hesum.
Nú kunnu fólk, sum lata rusk inn til Brennistøðina, velja at seta tað, sum er ov gott at brenna, í eina serliga bingju, sum tey í Tinghúsinum tøma eina ferð um vikuna. Hevði onki Tinghús verið, høvdu tingini farið upp í royk á Brennistøðini.
Tankin aftanfyri Tinghúsið er sera positivur: Vit verja umhvørvið við at endurnýta ting, og fólk, sum annars høvdu verið uttanfyri arbeiðsmarknaðin, fáa arbeiði, og í hesum krepputíðum er heldur ikki so galið at fáa okkurt nýtt til heimið fyri ein lítlan penga.
Tingini, vit funnu, kostaðu millum 5–30 krónur.





Hesar høvdu riggað væl í køkinum, um tær fingu nøkur løg av hvítari máling .. ella kanska í gentukamarinum?

## Plásstrot kveikir kreativar loysnir





**Visti tú: Skrúvimaskinan er Guds gáva til kvinnuna!**

**Tóma klædnaskápið er gandað um til eitt fínt lítið arbeiðspláss. Legg fyri við at mála veggin, og fá síðani timburdeildina at saga tær nakrar hillar eftir máti úr træi ella laminat. Set hillarnar og borðplátuna upp við nøkrm listum, sum tú skrúvar upp á veggin. Set eisini eina borðplátu upp á sama hátt, men við eitt sindur breiðari listum undir. Ofta fæst ein rest av køksborðplátu fyri lítlan penga.**

**Fiksur reólveggur**
**Hevur tú eina gamla kommodu, kanst tú taka skuffurnar úr og stápla tær upp móti vegginum sum eina fittliga reól..**



Í kreativa horninum • Í kreativa